Bjarni Hammer
løgtingsmaður

Nr. 41/2020

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur viðvíkjandi Skúlaheiminum í Marknagili, settur landsstýrismanninum við uttanríkis- og mentamálum Jenisi av Rana (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Hvat er langtíðarætlanin við Skúlaheiminum í Marknagili?
2. Nær verða átrokandi ábøturnar gjørdar á Skúlaheiminum?
3. Fara búsitandi á Skúlaheiminum at fáa umstøðurnar aftur, sum eru tiknar frá teimum, eftir at Glasir lat upp?
4. Ætlar landstýrismaðurin at arbeiða fyri, at lærlingar, sum skulu til meginøkið at búgva í lærutíðini í samband við skúlagongdina, fáa avsláttur í leiguni á Skúlaheiminum komandi árini?

Viðmerkingar:
Skúlaheimið í Marknagili hevur verið síðani 1976, við sínum 51 kømrum, og er tryggi bústaðurin hjá lærlingum kring landið. Sjálvt um Skúlaheimið hevur verið afturúrsiglt, hvat viðlíkahaldi viðvíkur, so er tað helst enn í dag størsti savningarmiðdepilin fyri lærlingar, serliga úr Suðuroynni og Sandoynni. Sjálvt um bygningurin ikki er raðfestur seinastu mongu árini, so hevur trivnaðurin millum lærlingarnar á Skúlaheiminum verið í hásæti og hevur knýtt nógv vinarbond fyri lívið. Í uppihaldsrúmunum og felagskøkinum í heiminum hittast lærlingar til gaman og álvara eftir skúlatíð.
Seinastu tíðina hevur trivnaðurin eisini fingið eitt skot fyri bógvin, tí avgerð er tikin um, at stásiligi, stóri og nýggi grannabygningurin Glasir, orsakað av plásstroti, hevur yvirtikið stórar partar av Skúlaheiminum til undirvísing m.a. uppihaldsrúmini og felagskøkin í heiminum, har lærlingar hittast til gaman og álvara eftir skúlatíð.
Leiðslan á Skúlaheiminum hevur gjøgnum áratíggju gjørt vart við trupulleikan av manglandi raðfesting og viðlíkahaldi. M.a. eru tvær frágreiðingar frá ávikavist 2012 og 2016 gjørdar um støðuna á heiminum, sum neyvt lýsa støðuna og átrokandi uppraðfestingarnar, sum heimið veruliga hevur tørv á. Skúlaheimið treingir til høvuðsumvæling av øllum kømrunum, serliga eru tað vesi- og baðirúmini, sum eru niðurslitin, eins og innbúgvið, sengur, borð o.l., sum eru frá 1976, er nógv slitið. Mitt í 90unum blivu vindeygu skift og útsíðurnar klæddar, men veður og vindur og árini hava veruliga sett síni spor.
Ætlanin við Skúlaheiminum var, at tað skuldi vera eitt heim, har næmingar sova, eta allar máltíðir og njóta frítíðina saman við øðrum næmingum. Manglandi viðlíkahald av heiminum, og tað at Glasir hevur yvirtikið partar av heiminum, hevur ávirkan á trivnaðin á staðnum.
Tá lærlingar skulu á skúlabonk í Tórshavn, verða serliga tey, sum er noydd at flyta til Havnar, m.a. úr Suðuroynni, hart rakt fíggjarliga. Lærlingar eru vanliga í skúla 20-40 vikur í senn. Tí kann tað vera sera trupult hjá hesum lærlingum at fáa endarnar at røkka saman, til bara mest neyðugu útreiðslurnar til ferðing, mat og innivist í skúlatíðini. Sostatt eru hesir lærlingar ikki javnsettir við aðrar í skúlatíðini.

Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 4. novembur 2020

Bjarni Hammer